**Jørgen Niclasen**
**landsstýrismaður**

**Svar upp á fyrispurning nr. 55/2014 eftir § 52a í tingskipanini frá Kristinu Háfoss, løgtingskvinnu, um almenna keypsportalin og útboð av almennum keypi**

Sp. 1. Er eftirmeting gjørd av almenna keypsportalinum? Um ja, hvør er niðurstøðan?

**Svar:** Ein eftirmeting av Keypsportalinum verður gjørd í løtuni og er komin rættiliga væl áleiðis. Endaliga niðurstøðan er ikki tøk enn, men tað kann longu staðfestast, at landið hevur spart pengar við at bjóða út vørur og tænastur.

Sp. 2. Hvussu nógvar uppgávur eru útbjóðaðar á keypsportalinum og av hvørjum, síðan hesin varð tikin í nýtslu?

**Svar:** Landið hevur keypt fyri smáar 30 mió. kr. umvegis 26 útboð á Keypsportalinum, frá 1. oktober 2013 til 31. desember 2014.
Útbjóðararnir eru: Almannamálaráðið, Fíggjarmálaráðið, Fróðskaparsetrið, KT-Landsins, Landssjúkrahúsið, Landsverk, Løgmansskrivstovan, Mentamálaráðið, Skráseting Føroya, Strandferðslan og Vinnumálaráðið.
Í ár eru 6 útboð løgd út á Keypsportalin, men tey eru ikki øll endaliga avgreidd enn.

Sp. 3. Hvussu nógvir partar hava í miðal bjóðað upp á ymsu keypini av vørum og tænastum, ið eru útboðin.

**Svar:** Tað komu 115 boð inn til tey nevndu 26 útboðini. Tað gevur millum 4 og 5 boð til hvørt útboðið í miðal.

Sp. 4. Hvussu stórur partur av almennum keypi, ið sambært ásetingunum fyri portalin átti at verið útbjóðað, verður mett ikki er útboðið á portalinum.

**Svar:** Ásetingin er, at keyp av vørum og tænastum fyri meira enn 800 túsund uttan mvg skulu lýsast. Keyp millum 50 túsund og 800 túsund kann verða lýst, men tað er ikki eitt krav.
Í løtuni verður gjørd ein eftirmeting av Keypsportalinum og frágreiðing verður almenn seinni í ár.

Sp. 5. Kennir landsstýrismaðurin til ítøkilig keyp, ið av røttum áttu at verið útbjóðað á portalinum, men ikki vórðu útbjóðað? Um ja, hvørji og hví?

**Svar:** Landsstýrismaðurin kennir ikki til nakað ítøkiligt dømi um keyp oman fyri 800 tús. kr., ið ikki er boðið út umvegis Keypsportalin.

Sp. 6. Hví er arbeiðið at projektera komandi nýggja landssjúkrahúsbygningin og arbeiðið at dýpa havnina í Skopun í fjør ikki boðin út á keypsportalinum?

**Svar:** Rundskrivið frá 1. oktober 2013 um keyp av vørum og tænastum, er ikki galdandi fyri løgu- og byggiverkætlanir. Í sambandi við eftirmeting av Keypsportalinum verða hesi viðurskifti ætlandi lýst.

Sp. 7. Metir landsstýrismaðurin, at hetta er samsvarandi almenna setanarpolitikkinum, tá Gjaldstovan nú útbjóðar eitt verkætlanarleiðarastarv á keypsportalinum, har tímataksturin telur 50% í vektingini av, hvør fær starvið?

**Svar:** At orðingarnar eru soleiðis, at talan tað sama kundi verið um eitt leyst starv, er óheppið. Í hesum føri er talan um útbjóðing av eini konsulenttænastu. Eg haldi, at við keypsportalinum fáa vit betri gjøgnumskygni, eisini til keyp av konsulenttænastum. Tað verður framhaldandi soleiðis, at leys størv verða lýst leys at søkja, og skulu tey fylgja almenna setanarpolitikkinum. Vit fara at gera leiðreglur, sum gera greiðan skilnað millum nær talan er um konsulent tænastu og starvsetan.

Sp. 8. Er ætlanin, at almennir stovnar frameftir skulu kunna nýta keypsportalin at bjóða almenn størv fram á líknandi hátt?

**Svar:** Ætlanin er, at almennir stovnar fylgja rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum og tryggja gjøgnumskygni við keypi av ráðgevingaruppgávum soleiðis, at øll hava javnbjóðis møguleika at bjóða upp á tænasturnar. Tað verður framhaldandi soleiðis, at leys størv verða lýst leys at søkja, og skulu tey fylgja almenna setanarpolitikkinum.

Sp. 9. Metir landsstýrismaðurin ikki, at hetta kann verða við til at undirgrava vunnin lønarrættindi og samráðingarnar á arbeiðsmarknaðinum?

**Svar:** Nei, hesar útbjóðingar ávirka als ikki samráðingarnar á arbeiðsmarknaðinum, men tær økja um gjøgnumskygnið viðvíkjandi konsulenttænastum hjá tí almenna.

Argir, 25. februar 2015

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður